## Ein síða glapp ímillum

*Av tí at ein síða í faksinum við innlegginum hjá Signar Hansen datt í millum í gjár kom greinin at siga beint í móti tí høvundurin ætlaði. Vit endurprenta tí brævið frá Signar Hansen í dag í fullari longd.*

blaðstjórin

# Torbjørn gevur rangar upplýsingar



Nú løgmansrøðan var til viðgerðar á tingi, hevði undirritaði forfall og kundi sostatt ikki taka lut í orðaskiftinum. Men orðaskiftið varð útvarpað, so høvið var at hoyra tað.

Nakað ið fall mær fyri brósti, var tann fráboðan, ið Torbjørn Jacobsen bar fram, um at Almanna- og heilsuskúlin, ið skuldi verða í Havn, nú bráddliga skal verða á Tvøroyri. Samstundis segði hann, **at eingi boð frammanundan vórðu givin um,** hvar nevndi skúli skuldi verða. **Henda seinna fráboðan hansara var ósonn** og lítið sømilig fyri nývaldan landsstýrismann.

### Eitt sindur um gongdina í málinum

Undirritaði, ið sat sum landsstýrismaður undan Torbjørn J. legði lógaruppskotið um Almanna- og heilsuskúlan á tingborð. Undir 1. viðg. segði eg frá, at ætlanin var at leggja skúlan í Havn so tætt samstarv fór at verða millum Sjúkrasystraskúlan og nýggja Almanna- og heilsuskúlan. Víst varð á nógvar fyrimunir við hesi ætlan - bæði undirvísingarliga og fíggjarliga.

Somu sjónarmið bar eg fram á fundi í Løgtingsins mentamálanevnd.

Lógaruppskotið fekk fulla undirtøku í tinginum uttan at taka støðu til hvar í landinum skúlin skudi verða. Hesa avgerð hevði landsstýrismaðurin einsamallur. Landsstýrismaðurin tók ta avgerð, sum hann hevði boðað tinginum øllum og mentanarnevnd Løgtingsins frá, um at skúlin skuldi verða í Havn.

Tann 3. febr. varð Sjúkrasystraskúlin fluttur frá Almanna- og heilsumálastýrinum til Undirvísingar- og mentamálastýrið og tá varð farið undir fyrireikingar av tí nýggja skúlanum og sjálvandi eftir boðum landsstýrismansins í skúla- og mentamálum.

Alt hetta kundi Torbjørn J. fingið sær upplýsingar um frá sínum egna stýri, so hann slapp undan at gera rangar upplýsingar um tað sum er farið fram. Hann kundi somuleiðis ráðført seg við Høgna Hoydal.

### Viðgjørt av tingflokkinum

Annars fari eg at minna Torbjørn J. á, at spurningurin um hvar nevndi skúli skuldi verða, varð gjølla umrøddur í tingflokki okkara. Tá varð kjakast um, antin skulin skuldi verða í Sandoynni ella í Havn. Hergeir Nielsen bar uppá mál at leggja skúlan á Tvøroyri, men tóktist tað ikki at vera áhugi fyri tí.

Tað løgna hendi á fundinum, at øll løgtingsumboðini í Suðurstreymoy uttan Finnbogi Ísakson, vildu hava skúlan at liggja uttan fyri Havnina og helst í Sandoynni.

Endaliga niðurstøðan gjørdist, at ætlan landsstýrismansins, ið vardi av málinum um at leggja skúlan í Havn, varð tikið til eftirtektar við tí ískoyti, at skeið ið skúlin fór at skipa fyri, vórðu eisini hildin uttanfyri Havnina. Full semja varð um tað.

### Lista- og handverkskúlin úr Klaksvík

Annars boðaði sami landsstýrismaður frá at Lista- og handverkskúlin skuldi leggjast í Sandoynna. Tað er ein heilt ótrúliga løgin arbeiðsháttur, at vit sum eru í sama flokki og í samgongu fyrstu ferð frætta um hetta av tingsins røðarapalli. Fyrr hevur tað havt stóran og avgerandi týdning at slík mál hava verið umrødd í tingflokkinum. Henda siðvenja er nú avtikin, skilji eg, og landsstýrismaðurin kann taka støðu uttan at ráðføra seg við nakran.

Um Lista- og handverkskúlan er at siga, at klaksvíkingar hava lagt nógva orku í, at fingið slíkan skúla stovnsettan.

Ætlar Torbjørn J. veruliga at taka henda skúla frá klaksvíkingum leggja hann aðrastaðni í Føroyum? Hava Heini O. Heinesen og Karsten Hansen verið við í hesum leiki? Eg fái meg neyvan at trúgva tí, kenni eg teir rætt.

Sjálvur haldi eg, at skúlin framhaldandi eigur at verða í Klaksvík, tí tey fólk ið higartil hava arbeitt við hesum skúla, hava prógva stórt dugnasemi og eiga at fáa møguleikan at halda fram.

### Eftirskúlin

Tá ið lógin um eftirskúlar varð løgd fram, varð eisini nógv umrøtt, hvar ein slíkur skúli skuldi verða. Tingmanning Tjóðveldisfloksins tosaði nógv um hetta mál, men skal eg ikki koma nærri inn á tað, ið fór fram.

Eg skal ikki dylja yvir, at sjálvur havi eg hildið og haldi, at Sandoyggin og Suðuroyggin høvdu verið stak góð støð, at lagt slíkan skúla á. Men havast skal í huga, at talan er um ein sjálvsognarstovn, ið hevur sína serligu skipan og reglur at ganga eftir, ið m.a. sigur at tað eru stigtakarnir, ið avgera hvussu skúlin skal skipast og somuleiðis, hvar hann skal vera.

Men í lógaruppskotinum stendur somuleiðis, at landsstýrismaðurin í skúla- og mentamálum kann taka stig til slíkan skúla. So her eru møguleikar.

Samanumtikið skal verða sagt, at arbeiðsháttur landsstýrismansins í samband við, hvar skúlar skulu leggjast tykist rættiliga løgin. Mangir tingmenn høvdu tað á orði og ógvaðust um framferð landsstýrismansins. Eg kann bert leggja aftrat at eg teljist ímillum hesar, men eg vóni at landsstýrismaðurin tekur annað skinn um bak, so samgongan ikki fær óneyðugar trupulleikar aftrat at dragast við.

**Signar á Brúnni**



*Kanningarstjórin Petur Even Djurhuus gevur Bjørn á Heygum, advokati, nøkur orð á vegnum í sambandi við hansara harðligu fordøming av kanningini*

# Bjørn á Heygum og Signar á Brúnni kanningin

Løgtingið setti í verk eina kanning av embætisførsluni hjá Signar á Brúnni við undirritaða sum kanningarstjóra.

Henda kanning er av einhvørjari orsøk komin tvørtfyri hjá Bjørn á Heygum, advokati og hevur reaktiónin verið øgilig bæði í talu og uppá prent.

At gera viðmerkingar til viðmerkingarnar hjá Bjørn á Heygum til málið liggu ruttanfyri arbeiðssetning mín, so hetta fari eg at lata vera við so freistandi tað enn kann tykjast at kommentera hesar viðmerkingar, sum í so ríkiligan mun hava fingið tilført tað í saft, sum tær kanska mangla í kraft.

Meira er ikki at siga frá mínari síðu um hetta mál.

Harvið slepst eisini undan at falla í somu grøv sum mín kollega við einum hópi av negativt løddum karakteristiska sum løgin, margháttlig, ótrúlig, fantastisk, full av andsøgn, skammilig og skítbýtt.

Við kollegialari heilsan
**Petur Even Djurhuus**,
advokatur






Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Herfølge ruddiliga sett upp á pláss

*Uppgerðin í summarveðrinum á Sælandi minti nógv um tær, sum føroysku liðiðini plaga at vera annar parturin í*



*Undan dystinum vórðu gestirnir bodnir vælkomnir við m.a. sekkjapíputónleiki, og hetta fall onkrum áskoðara fyri bróstið*

Jóannes Hansen, Herfølge

Fyri fyrstu ferð nakrantíð var altjóða fótbóltur á skránni í Herfølge, tá Glasgow Rangers mikukvøldið vitjaði á summarklædda stadion í Køge Kommunu. At verturin var lítil og óroyndir sást á fleiri brøgdum. Dystarprogrammið - eitt falsað A3 ark - var ússaligari enn tey flestu, tá føroysk lið spæla heimadyst í Europa Cup. Tað tóktist heldur ikki sannførandi, og tað hóvaði heldur ikki heimaáskoðarunum, tá vertirnir undan dystinum høvdu sekkjapípumann á vøllinum, umfram at hann í steðginum spældi Amazing Graze við sekkjapípum. Tað tóktist, sum áskoðararnir hildu, at hetta var at taka fyrimunin av heimavølli burtur.

Og á vøllinum vóru heimamenninir serliga í 1. hálvleiki tungir og fjálturs-stungnir.

- Í steðginum segði venjarin, at vit skuldu gloyma alt uttan-hóvastákið og spæla frígjørt. Eg haldi, at okkara avrik var væl betri í 2. hálvleiki, og tað var spell, at vit í hvussu so er ikki skoraðu eitt mál.

Hetta segði Jákup Mikkelsen eftir 3-0 tapið. Hann var einasti maður á heimaliðnum, sum áður hevði verið í altjóða uppgávum. Umframt landsdystir, hevur hann roynt seg í Europa Cup. Tað gjørdi hann, tá KÍ í 1992 spældi móti Skonto Riga.

John Faxe Jensen er Herfølge maðurin við størstu altjóða royndunum. Mikukvøldið helt hann seg tó á síðulinjuni í samfullar 90 minuttir:

- Eisini í dystum, sum verða taptir, ber til at finna okkurt positivt. Vit taptu 3-0, og tað vóru røttu menninir, sum løgdu rygg til tapið. Um tað framyvir hevði verið málleyst miðskeiðis í 2. hálvleiki, so hevði eg sett meg sjálvan inn á vøllin, segði Herfølge venjarin.

### Málini

Jákup Mikkelsen hevur eftir summarsteðgin fingið sær annan málmansvenjara. Talan er um Svend Knudsen, sum var fyrsti málmansvenjari hjá Jákupi í Herfølge. Tá Ole Mørch fór til AB, gjørdist Svend Knudsen hjálparvenjari, og eina tíð hevði Jákup ongan málmansvenjara. So gjørdist fyrrverandi kappingarneytin hjá Jákupi, Kai Larsen, málmansvenjari, men í nýggja kappingarárinum arbeiða Svend Knudsen og Jákup Mikkelsen aftur saman.

Málmansvenjarin nýtti 50 ára føðingardagin hjá sær til at hita Jákup upp, og føroyski landsliðsmálverjin stóð seg sum heild væl.

- Eg haldi, at hann kundi havt bjargað fyrsta málinum. Skotið hjá týska Jörg Albertz var gott, men tað var úr 35 metrum, og sýnið hjá Jákupi var gott, helt Herfølge venjarin eftir dystin.

Jákup segði einki um hetta, men onkur tíðindamaður helt, at málmaðurin kundi ikki lastast fyri dúkkandi og skrúvandi brandskotið, sum fór dygst undir samankomingini.

Hevði jákup havt bjargað skotinum, so hevði talan verið um framúr málverjaspæl. 28 minuttir vóru farnir, tá fyrsta málið kom. Tveir minuttir seinni var Jákup púra ósekur, tá mótstøðumenninir steðgaðu Herfølge uppspæli. Giovanni Van Bronckhorst streyk ígjøgnum í vinstru, og Rodney Wallace stýrdi flata innlegginum í kassan.

Í 2. hálvleiki drønaði miðverjin, Lorenzo Amoruso, eftir stutt fríspark úr 17 metrum framvið manngarðinum og upp í hornið - uttan møguleika hjá málverjanum.

### Herfølge meira skotskir

Glasgow Rangers er samansett av stórspælarum úr Hollandi, Italia, Týsklandi, Onglandi umframt skotum.

Fyrrverandi hollendski landsliðsvenjarin, Dick Advocaat, hevur fingið rættuligt fastlandssnið í spælið.

Jörg Albertz var ein ríur generalur, Giovanni Van Bronckhorst var sterkur í vinstru, og Stefan Klos í málinum vísti fleiri ferðir góðar bjargingar, tá Herfølge síðstu løtuna trýsti. Tá fekk Jákup eisini møguleikan, tí Rangers hótti við mótálopum.

Meðan Rangers brúkti hugfloðið og nógvar statiónir, so royndi Herfølge í skotskum stíli við longum sendingum fram á vøllin. Tað gav einki. Rangers fer at fáa fleiri stig í bólkaspælinum, meðan Herfølge er lítið meistarakent. Tað verður ivalaleyst at gera hjá Jákupi Mikkelsen í Hampden Park, Glasgow, annað mikukvøld.



*Einki er at ivast í, at føroyski landsliðsmálverjin fær nóg mikið at gera, tá Herfølge um tvær vikur vitjar á Hampden Park í Glasgow*